# Kunning um ólavsøkuna




## Ferðsla og P á ólavsøku

**Ólavsøkukonsertin** mánadagin 26. juli frá kl. 20.00 er Tórsgøta stongd frá sverrisgøtu (Mariu Poulsen) og oman í vágsbotn.

**Rennikapping** týsdagin 27. juli kl. 17.30-20.30; økið undir Bakka verður stongt fyri allari ferðslu.

**Kappróðurin** ólavsøkuaftan (millum kl. 14.00 og 19.00); Eystara Bryggja verður stongd fyri vanligari bilferðslu frá Kongabrúnni til Jónas Broncks gøtu. Somuleiðis er ikki loyvt at parkera á parkeringsøkinum á Bursatanga frá 27. juli kl. 20.00 til ólavsøkudag kl. 9.00.

**Ólavsøkuaftan, frá kl. 12.00 til fríggjadagin 30. juli kl. 12.00 eru hesar broytingar í ferðsluni:**
Bilferðsla er ikki loyvd eftir Áarvegnum frá Havnargøtu, niðan á Vaglið, í Mylnugøtu, í Niels Finsens gøtu frá Vaglinum og niðan til Sjónleikarahúsið, í Tórsgøtu, oman í Vágsbotn og yvir á Skálatrøð. Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Parkeringsøkið á Skálatrøð verður stongt fyri parkering 26. juli kl. 19.00. Um bilar standa á økinum verða teir fluttir.

Vanlig bilferðsla er ikki loyvd tvørtur um Niels Finsens gøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún, undantiknir eru hýruvognar, Bussleiðin og Bygdaleiðir.

Harumframt kann væntast at ferðslan á Áarvegnum, Vaglinum og Niels Finsensgøtu verður nervað munandi fyrrapartin ólavsøkuaftan, tí arbeitt verður við at seta upp sølubásar og gera aðrar fyrireikingar til ólavsøkuna.

Meira um parkeringsviðurskifti sæst á **www.torshavn.fo**

**Bussleiðin**
Mikudagin 28. juli (ólavsøkuaftan) koyrir Leið 1 seinasta túr av Hamrinum kl. 13.53, Leið 2 koyrir seinasta túr av Argjum kl. 14.05, og Leið 3 koyrir seinasta túr av Norðasta Horni kl. 14.05.

Hósdagin 29. juli (ólavsøkudag) er eingin koyring.

## á ólavsøku

Móttøkuhúsið hjá Tórshavnar kommunu í Tróndargøtu er opið ólavsøkudag millum kl. 16.00 og 18.00, har høvi verður at síggja listasavnið í húsinum og húsið annars. Eisini Ráðhúsið og Býráðssalurin eru opin ólavsøkudag kl. 16.00 til 18.00.

## WC á ólavsøku

Á ólavsøku hevur Tórshavnar kommuna wc-vognar standandi ymsa staðni í býnum.

**Vognarnir standa á hesum støðum:**
Á P-økinum við J. Paturssonar gøtu, á Skálatrøð og undir Bryggjubakka.

Harumframt verða kommunalu wc-ini opin í Kiosk Steinatúni, í Mylnugøtu og aftan fyri Sjónleikarhúsið.

## undir midnáttarsanginum

Midnáttarsangurin á Vaglinum ólavsøkukvøld er millum størstu tiltøk í Føroyum.

Samarittarnir hjá Reyða Krossi eru eisini á Vaglinum. Reyði Krossur hevur tríggjar støðir, soleiðis at tað altíð ber til at veita skjóta hjálp.

Telefon **112** ella **351448.**

Økið framman fyri Gamla Bókahandil er sett av til foreldur við barnavognum og smábørnum. Ansið væl eftir tykkum og tykkara næstrafólki.

**Sanghefti til midnáttarsangin**
Sanghefti til midnáttarsangin fáast í Snarskivuni frá mánadegnum 19. juli. Sangheftini fáast eisini í Ráðhúsinum og í Býráðssalinum, meðan opið er ólavsøkudag millum kl. 16.00 og 18.00. Somuleiðis fáast sanghefti í sambandi við sangløtuna á midnátt ólavsøkukvøld. Tá fara skótar at býta út á trappuni uttan fyri Býráðssalin.

## Góða ólavsøku!

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA